# Bussurin væl áleiðis

**Fyri góðum árið síðani varð byrjað at savna inn pening til ein buss á psykiatrisku deild á Landssjúkrahúsinum. Seinasta leygardag varð skipað fyri eini uppboðssølu við málningum, sum lands- og lokalpolitikkarar høvdu málað, og eisini var okkurt verkið hjá kendum listarfólki við**



*Uppboðssølan hjá psykiatrisku deild á Landssjúkrahúsinum gav 95.000 krónur til bussin savnað verður inn til*

*Mynd: Jens Kristian*

UPPBOÐSSØLA
*Ingrid Bjarnastein*

**Tórshavn:** Psykiatriska deild fekk 95.000 krónur inn á uppboðssøluni leygardagin, og hetta eru tey sjálvandi fegin um.

– Vit høvdu 55 málningar við, og prísirnir svingaðu frá 200 krónum til 6.000 krónur, sigur Æna Reinert, sum er ein av stigtakarunum.

Góð 200 fólk vóru komin saman henda seinnapartin á Landssjúkrahúsinum. Byrjanin var kanska eitt sindur stirvin, men sum frá leið, varð uppboðssølan lívlig og stuttlig, og tað syrgdi Rasmus Magnussen fyri. Tilsamans tók tað umleið tveir tímar at selja allar málningarnar.

– Nú vanta bert okkurt um 20.000 krónur, so hava vit nóg mikið til bussin. Uppboðssølan var avgjørt eitt sera gott íkast til innsavningina. Vit hava annars havt ymisk tiltøk til at savna pening inn, og fólk sum heild hava verið ógvuliga positiv hesum viðvíkjandi, og stovnar og onnur hava eisini latið stuðul, og hetta eru vit ógvuliga takksom fyri, sigur Æna Reinert.

Tey á psykiatrisku deild eru ógvuliga glað fyri, at fólk hava tikið so væl undir við tiltakinum, og í nærmastu framtíð verður helst møguligt hjá teimum at keypa bussin, sum fer at geva sjúklingunum á deildini nógv betri møguleikar.

# Toskaveiðan skal minkast

**Norskir granskarar vilja vera við, at toskaveiðan eigur at verða minkað frá 50-60 prosentum, hon er í dag, niður til 33 prosent**

FISKIVINNA
*Ingrid Bjarnastein*

**Noreg:** Norskir granskarar siga, at árliga toskaveiðan skal minka munandi, og hetta fara teir at leggja fram á fundi í Altjóða ráðnum í havgransking í komandi viku. Hetta skrivaði IntraFisk í gjár.

– Veiðan av toski í dag er alt ov stór. Vit fiska millum 50 og 60 prosent av nøgdini, ið kann verða veidd. Skulu vit hava eina vón um at fáa gýtingarlagið upp á eitt ráðiligt stig, fara vit at mæla til, at veiðan í 2003 ikki verður størri enn 33 ella 34 prosen, sigur deildarleiðarin, Kjell Nedreaas í havgranskingarstovninum.

## Hørð mál

Tað er í næstu viku, at norsku havgranskararnir fara til Keypmannhavnar at hitta limirnar í altjóða ráðnum fyri havgransking. Málið hjá Noregi er at limirnir í ráðnum skulu verða samdir um, at eitt viðmæli á 33-34 prosent av toski í Barentshavinum. Við minkingini vóna granskararnir at fáa gýtingarlagið upp frá 300.000 tonsum til 500.000 tons innan fá ár. Nederaas sigur, at hetta kan verða eitt hart mál at náa longu í 2003.

– Sannlíkindini fyri, at vit skulu klára hetta, hava nógv við, hvussu nógv av toski verður fiskaður framyvir, sigur Nederaas.

Granskararnir frá Havgranskingarstovninum skulu nú í gongd við útrokningarnar um, hvussu fiskastovnar klára seg, og hetta inniheldur eisini granskingarúrslit frá Russlandi og øðrum londum, fiska á hesum stovninum. Nedreaas vónar, at viðmælið frá Havgranskingarráðnum verður tikið til eftirtektar.

# Skotið í gravimaskinu

**Leygardagin varð herverk meldað um eina gravmaskinu, sum stendur uttanfyri Eikina á Argjum**

HERVERK
*Ingrid Bjarnastein*

**Argir:** Tveir rútar eru brotnir. Ein framman og ein á síðuni, og hevur onkur skotið í rútin. Herverkið er helst framt náttina til leygardag, men av politigarðinum í Havn, verður sagt, at gerningsmenninir eru ikki funnir enn. Einasta, sum er gjørt við málið higartil er, at tað er skrivað ein rapport um tað.




*Hol vóru skotin í rútin á hesi gravmaskinuni náttina til leygardagin. Løgreglan veit framvegis ikki, hvørjir gerningsmenninir eru*

*Mynd: Jens Kristian*




